# 13.000 føroyingar fáa næstan onki gagn av skattalætta hjá samgonguni

**– Tey, sum fáa mest burturúr skattalættanum hjá samgonguni, eru teir 1800 føroyingarnir, sum hava yvir 400.000 krónur í løn um árið**

SKATTALÆTTI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Ætlaði skattalættin hjá samgonguni er heilt burturvið.

Tað staðfesta arbeiðarafeløgini enn einaferð.

Tey hava nú gjørt nýggjar útrokningar sum vísa, hvussu ætlaði skattalættin hjá samgonguni fer at ávirka teir ymsu lønarbólkarnar.

Og útrokningarnar skuldi verið heilt eftirfarandi, tí tað er sjálvt Toll- og Skattstova Føroya, sum hevur gjørt tær.

Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, hevur givið arbeiðarafeløgunum loyvi til at brúka Toll og Skatt til at gera nakrar útrokningar í sambandi við ætlaða skattalættan.

Tað eru Føroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðsmannafelag og tey bæði arbeiðarafeløgini í Klaksvík, sum hava staðið fyri útrokningunum.

Og roknistykkið vísir, at tað verða heilir 13.000 føroyingar, sum næstan onki gagn fara at fáa burturúr ætlaða skattalættanum, siga arbeiðarafeløgini eftir at hava gjøgnumgingið roknistykkið.

Hetta eru teir føroyingar, sum hava tær lægstu lønirnar og sum ikki hava meiri enn 75.000-170.000 í løn um árið.

Arbeiðarafeløgini leggja dent á, at í hesum bólkinum eru giftir fólkapensjónistar og giftir og stakir fyritíðarpensjonistar við lægstu pensjón, ikki taldir uppí, tí teir forvinna minni enn 75.000 krónur um árið.

– Hinvegin vísir roknistykkið eisini, at tey, sum fáa allarmest burturúr skattalættanum eru teir 1.800 føroyingarnir, sum hava meiri enn 400.000 krónur í løn um árið.

– Men allarmest burturúr skattalættanum fáa teir 1.650 løntakararnir, sum hava yvir burturúr skatt.

Arbeiðarafeløgini siga, at løntakarar, ið bara hava 170.000 krónur í ársinntøku, fáa 365 krónur um árið í skattalætta, ella 30 krónur um mánaðin.

Men løntakarar, sum hava 450.000 krónur í inntøku um árið, fáa 4.340 krónur um árið í skattalætta um árið, ella 362 krónur um mánaðin.

Og løntakarar við 670.000 krónum um árið í ársinntøku, fáa 5.990 krónur um árið í skattalætta, ella 500 kr. um mánaðin.

– Ein háinntøka upp á 670.000 krónur um árið, fær sostatt 16 ferðir so stóran skattalætta, sum ein ársinntøka uppá 170.000 krónur.

– Slíkir skattalættar eru heilt burtvið, siga arbeiðarafeløgini.

Tey minna á, at tað vanliga er, at skattapolitikkurin er eitt til at føra eina samhaldsfasta inntøkujavning.

– Ætlaði skattalættin hjá samgonguni brýtur hesa meginreglu og hetta sær út til at vera fyrsta stig at bróta hesa sunnu og samhaldsføstu meginreglu um at útjavna inntøkurnar ígjøgnum skattapolitikkin.

Arbeiðarafeløgini vísa eisini á, at ætlaði skattalættin hjá samgonguni fevnir yvir fýra ár.

Men leisturin er tann sami øll fýra árini.

– Og tað kann ikki vera rætt at geva háløntum stórar skattalættar í fýra ár á rað. samstundis sum láglønt lítlan og ongan skattalætta fáa, siga tey fýra arbeiðarafeløgini.

– Sostatt vendir ætlaði skattalættin sosialt skeivt og tað kunnu arbeiðarafeløgini ikki góðtaka leggja tey afturat.

Tey siga, at sostatt má uppskotið broytast so at tey við lágum og miðalinntøkum í minsta lagi fáa líka stóran skattalætta í krónum sum háinntøkurnar.

– Verður hugsað um konjunkturstøðuna, eigur skattalættin ikki at fara til háinntøkur, men til lág- og miðalinntøkur.

– Hjá lág- og miðalinntøkum, fara møguligar eykainntøkur sum t.d. ein skattalætti, til at keypa nýtsluvørur fyri, sum tey hava brúk fyri, ella ynskja sær.

Men fólk við høgum inntøkum, ikki brúka møguliga eykainntøku til nýtslu av forbrúksvørum, tí tað hava tey ráð til frammanundan, men til uppsparing, halda arbeiðarafeløgini.

– Sostatt fer ein eykainntøka til háinntøkur ikki at bøta um konjunkturstøðuna í landinum, siga arbeiðarafeløgini.

Tey hava nú havt fund við fíggjarnevndina hjá løgtinginum, har tey hava lagt sínar útrokningarnar fram.

Og tey bæði vænta og vóna at meiriluti fæst í løgtinginum fyri, at tað verða tey lág- og meðalløntu, sum í stóran mun hava brúk fyri meiri peningi til neyðugt og vanligt forbrúk, ið fáa skattalætta komandi árini, og ikki tey við høgum inntøkum, sum ikki hava brúk fyri eykainntøku fyri at lívbjarga sær.



*– Tað er ikki ætlanin at tey, sum hava brúk fyri eini eykainntøku, skulu fáa nakran skattalætta. Hinvegin skal ein lítil minniluti av føroyingum við sera høgari løn, hava næstan allan skattalættan, siga arbeiðarafeløgini og tað góðtaka tey ikki*

*(Savnsmynd)*

# Kjarnin í arbeiðarafjøldini fær lítlan og ongan skattalætta frá samgonguni

**– Skal tað loysa seg at arbeiða, er tað alneyðugt, at ætlaði skattalættin kemur kjarnuni í verkafjøldini til góðar, men tað ger ætlanin hjá samgonguni als ikki, siga arbeiðarafeløgini**

SKATTALÆTTI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tá ið ætlaði skattalættin hjá samgonguni er settur í verk, fær eitt verkfólk við eini ársinntøku upp á 170.000 krónur, ein árligan skattalætta uppá 3.160 krónur um árið.

Men ein løntakari við eini ársinntøku upp á 500.000 krónur, fær ein skattalætta uppá 38.660 krónur um árið.

Hetta er skattapolitikkurin hjá sitandi samgongu og hetta góðtaka arbeiðarafeløgini als ikki.

Tey hava nú bæði vent sær til løgmann og til fíggjarnevndina at mótmæla ætlaða skattalættanum hjá samgonguni.

Tey siga, at ætlaði skattalættin hjá samgonguni vendir skeivt og tí vilja tey hava, at skattapolitikkurin verður broyttur, so at hann fer at koma lág- og miðalinntøkunum til góðar.

– Sum er, fær kjarnin í verkafjøldini lítla og onga nyttu burturúr ætlaða skattalættanum. Men skal skatturin lækkast, má hann gagna borgarum við lág- og miðalinntøkum.

Føroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðsmannafelag og tey bæði arbeiðarafeløgini í Klaksvík, eru samd við landsstýrið í aðalmálinum um, at tað skal loysa seg at arbeiða

– Men samgongan má leggja sær í geyma, at tað er serliga umráðandi, at tað loysir seg hjá fjøldini at arbeiða og fjøldin er júst tey við miðal- og lágum lønum.

– Tað er minni umráðandi at fjálga um ein minnilutabólk av háløntum lønmóttakarum, leggja tey afturat.

Sum víst á í hinari greinini, halda Arbeiðarafeløgini, at ætlaði skattalættin fer til skeivan bólk í samfelagnum.

Tí mæla tey til, at skattalættin verður broyttur.

Samstundis hava tey tikið stig til at gera ein nýggjan skattastiga, sum Toll- og Skattstovan hevur hjálpt teimum við, við vælsignilsi frá landssýrismanninum í fíggjarmálum.

Arbeiðarafeløgini halda, at tað er serstakliga umráðandi, at tað skal loysa seg at arbeiða hjá miðal- og lágløntum, soleiðis at hesi kunnu fáa meira pening til vanligt forbrúk - og at skattalættin tískil ikki eigur at fara til hálønt, ið hava nógv mikið av peningi til vanligt forbrúk, marglætisnýtslu umframt pening til privata uppsparing.

### Landið kann spara næstan 14 milliónir

Eftir uppskotinum hjá arbeiðarafeløgunum, fer skattalættin at kosta landskassanum 45.860.447 krónur. Sostatt fer landið at spara 13.841.614 krónur, tí ætlaði skattlættin hjá landsstýrinum er mett at kosta 59.702.061 krónur.

**Uppskot til skattatalvu**

| Er inntøkan kr. | men minni enn kr. | verður latið kr. av | av | og av restini % |
|---|---|---|---|---|
| - | 24.000 | - | 24.000 | % |
| 24.000 | 75.000 | - | 24.000 | 7,0% |
| 75.000 | 135.000 | 3.570 | 75.000 | 20,0% |
| 135.000 | 185.000 | 15.570 | 135.000 | 24,0% |
| 185.000 | 300.000 | 27.570 | 185.000 | 36,5% |
| 300.000 | | 69.545 | 300.000 | 37,0% |

*Hetta er uppskotið til skattatalvu, sum arbeiðarafeløgini hava gjørt og sum rakar nógv rættvísari enn ætlaði skattalættin hjá landsstýrinum*





*– Menningarlondini hava brúk fyri hjálp uttanífrá fyri at menna sítt samfelag, og føroyingar kunnu eisini gera góðan mun, sigur Dr. Bista, sum sjálvur stendur á odda fyri einum arbeiði at miðspjaða valdið í Nepal. Hann hevur vitjað í Føroyum saman við Tommy Petersen seinastu dagar, og teir hava hitt bæði politikarar og vinnulív*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Føroyar kunnu gera mun við lítlum

**– Tær tríggjar milliónirnar, sum føroyingar vilja brúka í menningarhjálp, kunnu gera stóran mun, men føroyingar skulu velja sær nakrar ávísar verkætlanir at arbeiða við, sigur leiðandi ráðgevin hjá Danida í Nepal, sum júst hevur verið á vitjan í Føroyum**

MENNINGARHJÁLP
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Hóast føroyingar hava ein avmarkaða upphædd av ráða yvir til menningarhjálp, ber saktans til at gera mun við hesi upphædd.

Tað eru boðini frá Dr. Himat Bista, sum er leiðandi ráðgevi hjá Danida í Nepal.

Hann hevur júst verið á vitjan í Føroyum, og á einum fundi við løgmann, landsstýrismen og løgtingsmenn greiddi hann frá, hvussu tað ber til at arbeiða við verkætlanum í menningarlondunum.

– Menningarlondini hava brúk fyri hjálp uttanífrá fyri at menna sítt samfelag, og føroyingar kunnu eisini gera góðan mun, sigur Dr. Bista, sum sjálvur stendur á odda fyri einum arbeiði at spjaða valdið í Nepal.

### Fleiri pengar at ráða yvir

Seinastu árini hava føroyingar sett nakrar fáar hundrað túsund krónur av til neyðhjálp og menningarhjálp, og meginparturin av hesum pengum hevur verið nýttur til aktuella neyðhjálp í illakomnum økjum.

Nýggja samgongan sigur seg hava sett sær fyri, at føroyingar skulu hjálpa meira í útlondum, og upphæddin á fíggjarlógini fyri 2005 gevur eisini ábendingar um, at álvari er aftan fyri orðini. Í øllum førum er upphæddini, sum er sett av til menningar- og neyðhjálp, vaksin upp í tríggjar milliónir krónur.

Í eini samtykt á aðalfundi hjá Sameindu Tjóða er mál sett, sum áleggur ídnaðarlondum at veita menningarlondum hjálp svarandi til 0,7 prosent av bruttotjóðarúrtøkuni hjá einstaka ídnaðarlandinum.

Játtanin upp á tríggjar milliónir krónur svarar til 0,03 prosent av føroysku bruttotjóðarúrtøkuni, so langt er frá málinum hjá ST, hóast játtanin er nógv vaksin eftir einum ári.

### Serfrøðingar greiddu frá

Í 2003 var aðalorðaskifti um altjóða menningarpolitikk í løgtinginum, og løgmaður ætlar sær við grundarlagi í hesum at leggja uppskot fyri løgtingið um, hvussu reglarnar skulu vera fyri menningarhjálp.

Ein partur av hesum arbeiði er at kunna seg við, hvussu tað verður arbeitt í øðrum londum, og hvussu Føroyar kunnu koma upp í á ein skilagóðan hátt.

Tí hevði løgmaður boðið Dr. Bista úr Nepal til Føroya, og eisini var Tommy Petersen boðsendur úr Egyptalandi, har hann nú arbeiðir við miðspjaðing av umhvørvismáleráðnum.

Mánadagin vóru teir á fundi við politikarar, og týsdagin var vinnulívið kunnað um menningararbeiði.

### Miðvís hjálp er best

Dr. Himat Bista fegnast um, at føroyingar eru hugaðir at veita størri menningarhjálp, og hann hevði onkur góð ráð at bera myndugleikunum.

– Tað ræður um at velja sær okkurt einstakt projekt, sum tað verður farið í holt við. Vit skulu hugsa globalt, men handla lokalt, og tað umfatar eisini menningarhjálp, sigur Dr. Bista.

– Støddin á upphæddini er ikki altíð so avgerandi, men heldur, at hjálpin er miðvís, og tað ber eisini til at hjálpa við øðrum enn pengum, til dømis serfrøðingahjálp av ymsum slagi, sigur hann.

Tann verkætlanin, sum Dr. Bista sjálvur stýrir í løtuni, byrjaði við eini upphædd á tríggjar milliónir krónur um árið í fimm ár, og úrslitini vóru so góð, at hildið var áfram við verkætlanini.

– Hetta vísir, at tað eru ikki so ræðandi stórar upphæddir, sum altíð skulu til fyri at hjálpa. Tað ber eisini til hjá føroyingum at samstarva við onnur um eina verkætlan, sum ger stóran mun í tí økinum, har hon verður framd, sigur Dr. Bista.

Hann fór av landinum aftur mikudagin, eftir at hann hevði steðga í Føroyum í fýra dagar.



*Dr. Himat Bista og Tommy Petersen hava greitt føroyskum politikarum og vinnulívi frá arbeiðinum í menningarlondum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Plátufelagið væntar nógv av Eivør

Íslendska plátufelagið 12 Tónar, sum júst hevur givið nýggja fløgu út við Eivør Pálsdóttir, væntar sær nógv av nýggju útgávuni.

– Útgávan »Krákan« gekk sera væl, og tað hevði verið hugaligt, um tann nýggja fløgan kundi selt eins nógv, sigur umboð fyri 12 Tónar.

Krákan hevur selt um 10.000 eintøk í Íslandi, Føroyum, Danmark og Svøríki, og tað er plátufelagið sera væl nøgd við. Eivør var fyrsta útgávan hjá 12 Tónum, og tað gekk óvæntað væl við útgávuni. Nýggja útgávan hjá Eivør er nummar 10 hjá 12 Tónum.

Sunnudagin skal Eivør hava útgávukonset í Operahúsinum í Reykjavík. Hetta er sama stað, sum hon spældi í, tá ið Krákan kom út í fjør.

Nýggja fløgan kom mikudagin í handlarnar í Íslandi, og plátufelagið roknar við, at rættilig gongd kemur á søluna eftir konsertina hjá Eivør sunnudagin.

**ek**

## Landaplága roynir seg aftur

Ein av sangunum, sum hesa vikuna er eykalag á 15 teimum bestu, er ein gamal kenningur. Í rúgvuni av nýggju sangum er eisini sangurin Til Allar Vinir, sum Blátt gav út fyri eini 15 árum síðani.

Sangurin hevur verið sera nógv spældur í Útvarpinum, og nú er hann komin við á savnsfløguna Popplist 3. Hetta hevur við sær, at sangurin eisini er blivin eykalag á 15 teimum bestu og skal royna eydnuna millum eitt nýtt ættarlið av ungfólki.

Atkvøðast kann fyri sanginum og øðrum sangum á heimasíðuni hjá Útvarpinum.

**ek**

## Tjaldrið sleipaði Ågot

Ågot fekk mikumorgunin maskinbrek í Djúpunum, og boð vórðu send til Vaktar- og Bjargingartænastuna um hetta. Boðini komu beint fyri klokkan sjey mikumorgunin, og Tjaldrið fór avstað at hjálpa.

Tjaldrið sleipaði Ågot til Klaksvíkar, har skipið er heimahoyrandi, og um tíggju-tíðina var Ågot komið til bryggju í Klaksvík.

Hóast Ågot var inni við land var eingin vandi á ferð, og teinurin at sleipa úr Djúpunum og inn til Klaksvíkar var stuttur.

**ek**